## Eldur settur á ein bil

Hóskvøldið varð eldur settur á ein lastbil niðast á Velbastaðvegnum í Havn. Løgreglan hevur enn ikki tikið nakran gerningsmann, men kriminaldeildin arbeiðir við málinum.

## Blakað avroðini í ánna

Fríggjadagin varð ein maður í Vágunum meldaður, fyri at hava blakað avroðini í ánna, eftir at hann hevði flett. Hetta er sum kunnugt ikki loyvi, tí alt burturkast eftir flettingina, skal latast í byngjurnar hjá IRF.

Løgeglan í Vágunum hevur málið um hendi, og maðurin kann vænta sær at fáa eina bót.

## Ferðsluóhapp Millum Gilja

Leygarnáttina fór ein bilur út av vegnum Millum Gilja. Førarin var yvir 18, men hevði ikki koyrikort. Hann var eisini ávirkaður av rúsdrekka. Fleiri ung vóru í bilinum, og tvey teirra endaðu á skaðastovuni. Ein hevði brotið nøsina og fingið aðrar smáskaðar í andlitið, meðani hin varð seymaður í hondina, umframt at hann hevði fingið ymsar smásnuddir ymsa staðni á kroppin. Løgreglan sigur, at tey tó høvdu tað gott eftir umstøðunum. Førarin verður í næstum ákærdur fyri rúsdrekkakoyring.

## Maður tikin við hashi

Leygarnáttina var løgreglan í Klaksvík biðin at koma á staðið, tá nakað av ófriði var í býnum. Ein maður varð tikin, og tá hann varð kannaður, vísti tað seg, at hann hevði 2 gramm av hashi í lummanum.

# Vilja seta ferð á føroyska skipaskráseting



*Sjúrður Guðjónsson og Kristin Rasmussen, ið eru fyriskiparar av ráðstevnuni um altjóða skipaskráseting, halda tað verða alneyðugt, at føroyingar fara undir at gera meiri við júst hetta øki*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Tveir lærarar á Føroya Sjómansskúla, Sjúrður Guðjónsson og Kristin Rasmussen, hava tikið stig til stóra ráðstevnu um altjóða skipaskráseting í komandi viku, tí teir halda, at altjóða skipaskráseting kann gera mun í Føroyum**

ALTJÓÐA SKIPASKRÁSETING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Hóast føroyingar í mong ár hava havt eina altjóða skipaskráseting, so eru bert nøkur heilt fáa útlendsk skip í føroysku skipaskrásetingini. Hetta halda menn á Føroya Sjómansskúla verða stórt spell, og teir royna tí nú at birta undir aftur kjakið, um tað ikki er rætt at fáa lagt lunnar undir eina altjóða føroyska skipaskráseting, ið kann verða freistandi fyri útlendsk reiðaríir.

### Lagast til tørvin

Teir báðir lærararnir á sjómansskúlanum, Sjúrður Guðjónsson og Kristin Rasmussen, eru millum teirra, ið halda, at vit sum skjótast eiga at fáa broytt okkara altjóða skipaskráseting, soleiðis at hon gerst meiri áhugaverd fyri útlendingar. Teir siga, at tað er neyðugt hjá føroyingum at fara út og spyrja útlendsk reiðarí, hvat tey vilja hava, og hvat teimum tørvar fyri møguliga at skráseta síni skip í Føroyum.

– Vit noyðast at hugsa um nýggjar vinnuvegir, og hetta er avgjørt ein vinnuvegir, ið kann gerast serstakliga áhugaverdur fyri føroyska samfelagið. Vit skulu minnast til, at fáa vit nógv fremmand skip í okkara skráseting, so gevur hetta økt virksemi til nógvar vinnubólkar, so sum umboðsvirksemi, skrásetingar, eftirlitsvirksemi, banka- og tryggingarvirksemi, advokatvirksemi umframt mangt annað, sigur Sjúrður Guðjónsson, sum tó leggur afturat, at talan í fyrstu atløgu neyvan verður um fleiri arbeiðspláss til føroyingar á sjónum.

– Tað er tó av alstórum týdningi, at vit ikki bara fara út við onkrum hálvum. Tað skal verða ordiligt og áhugavert fyri kundarnar, tí annars spyrst onki burturúr. Er okkara tilboð ikki meiri enn næstbest, so koma vit ongan ongan veg, tí tað ryktast so ómetaliga skjótt í vinnuni, hvussu tær ymisku skipaskrásetingarnar eru, sigur Sjúrður Guðjónsson.

### Onnur oyggjasamfeløg eru frammalaga

Fleiri oyggjasamfeløg kring heimin eru frammalaga á skipaskrásetingarmarknaðinum, vísa teir báðir sjómansskúlalærararnir á. Eitt nú hevur Isle of Man eini 400 til 500 útlendsk skip í sínari skipan, og harav eru eini 70 teirra donsk.

Teir báðir lærararnir meta, at fara føroyingar í næstum av álvara undir at gera nakað við sína altjóða skipaskráseting, er ikki óhugsandi, at vit um eini 10 ár hava okkurt um 500 fremmand skip í skrásetingini, um karmarnir eru teir røttu.

Tað er tó av stórum týdningi, at rætt verður borið at. Sjúrður Guðjónsson og Kristin Rasmussen siga, at tað er alneyðugt, at Føroya Landsstýri tekur fyrsta stigið til at fáa karmarnar í rættlag. Her verður hugsað um eina nýggja skrásetingarlóg og eina serliga skattalóg fyri hesi skip.

Áðrenn hettta verður gjørt, er tó neyðugt hjá føroysku myndugleikunum at fara út til møguligu kundarnar at kanna, hvat ið teir høvdu ynskt sær av einari føroyskari altjóða skipaskráseting. Tá ið hetta er gjørt, kunnu karmarnir tillagast, og síðani skal skipaskrásetingin marknaðarførast uttanlands. Sjálv marknaðarføringin noyðist ikki at gerast so kostnaðarmikil, siga teir báðir sjómansskúlalærararnir, tí er skipanin góð, ryktast tað ógvuliga skjótt í vinnuni um hana.

### Avbjóðing fyri Sjómansskúlan

Fæst gongd av álvara á eina slíka skipaskráseting, fer hetta eisini at seta krøv til Føroya Sjómansskúla og aðrar maritimar skúlar, siga teir báðir lærararnir á skúlanum.

– Skúlin noyðist so at koma inn við serkunnleika og skipa fyri skeiðum um serføroysk fyribrigdi, eitt nú á lógar-, trygdar- og heilsuøkinum, ið teir útlendsku yvirmenninir noyðast at kenna til, sigur Sjúrður Guðjónsson. Somuleiðis heldur hann, at ein slík skipan í longdini eisini kann hava eitt positivt árin á áhugan fyri at fara undir útbúgving á skúlanum.

Tí skipar Føroya Sjómansskúli fríggjadagin 29 oktobur fyri einari ráðstevnu um altjóða skipaskráseting. Fyrireikararnir siga seg vóna, at ráðstevnan kann verða ein neisti til eina veruliga politiska viðgerð av hesum evnum.

Á ráðstevnuni luttaka eitt nú landsstýrismenninir Bjørn Kalsø og Bárður Nielsen, ið skulu svara spurningum viðvíkjandi málinum. Harumframt verður undirstjórin í Dansk Rederiforening, Jan Frits Hansen, við, og hann fer at greiða frá, hvørji krøv, ið reiðarar seta til eitt land, ið vil verða við í kappingini um skráseting av skipum.

Aðrir, ið taka lut á ráðstevnuni, eru eitt nú Óli Hans H. Olsen, stjóri á Skipaeftirlitinum og Kristin Rasmussen, sjómansskúlalærari.



# Skipsbrotnir undir Suðuroynni



*mynd: Leivur Nygaard*

**Sunnukvøldið kundi ein rættilig bátsvanlukka verið hend vestanfyri Suðuroynna, tá ið tveir brøður úr Porkeri, Eirikur og Halgir Poulsen, vóru á veg úr Vági og norður til Hvalbiar í AWI 33-bátinum, Emily TG 69. – Meðan eg eri í maskinrúminum, er ein hvøllur brestur, og tað vísir seg, at tað er kjølurin sum tekur. Báturin stendur ikki, men í bølamyrkrinum síggja vit, at tað brýtur í bæði borð - bæði innanfyri og uttanfyri bátin**

SKIPSBROT
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eirikur Poulsen, sum eigur Emily og rør út við honum, skuldi á veg til útróðrar sunnukvøldið føra beiggja sín, Halgir, norður til Hvalbiar, har hann skuldi avstað við skipi. Síðan skuldu Eirikur og bátsfelagi hansara, Terjon Tausen, ætlandi loysa av Hvalba um 22-tíðina hetta kvøldið.

Men brøðurnir báðir, Eirikur og Halgir, komu ongantíð til Hvalbiar.

– Eg hevði tikið ís og olju í Vági, tá ið vit loystu um 18-tíðina. Veðrið var av tí besta, og vit væntaðu, at túrurin norður til Hvalbiar fór at taka slakar tveir tímar.

Eirikur sigur, at hann fekk bátin nýggjan, 21. juli 2001, og heilt síðan byrjanina, hevur hann havt trupulleikar við, at oljufiltrini typpast við tí úrsliti, at motorurin ikki orkar tað, hann eigur.

– Tá ið vit vóru komnir norður á syðra enda á Hvannhaga, helst á leiðini við Múlatanga, fingu vit trupulleikar við brenniolju-filtrinum. Motorurin gekk illa og vildi kódna. Eg avgjørdi tí at venda suðuryvir aftur.

Hann sigur, at løtu seinni hoyrdist kjøl-alarmur, og tá vóru teir staddir stutt úr landi.

– Eg fór niður í maskinrúmið at kanna eftir, hvussu vorðið var og bað beiggja mín taka róðrið. Í maskinrúminum stendur sjógvur uppundir blokkin á motorinum. Meðan eg eri í maskinrúminum, er ein hvøllur brestur, og tað vísir seg, at tað er kjølurin sum tekur.

Eirikur sigur, at báturin stendur ikki, men í bølamyrkrinum síggja hann og bróðurin, at tað brýtur í bæði borð - bæði innanfyri og uttanfyri bátin.

Longu tá ið Eirikur kemur uppaftur úr maskinrúminum, er beiggin, Halgir, komin í yvirlivilsisdraktina og hevur eina drakt klára til hansara.

– Hann hjálpir mær í draktina. Nú brýtur meira uttanfyri enn innanfyri. Dekkið á bátinum fyllist eisini við sjógvi, og Emily leggur seg eini 90 stig.

Teir senda nú út neyðarkall og siga, hvar teir halda seg vera staddar.

– Her sá ógvuliga svart, og lítil vón tóktist vera fyri bjarging.

Eirikur sigur, at Halgir nú flotaði bjargingarbátin og fer í hann.

Ætlanin hjá Halgiri var at vera í bjargingarbátinum og hava hann kláran, til Eirikur eisini kom uppí bátin.

Eirikur sigur, at motorurin á bátinum var í gongd alla tíðina og einu løtuna, tá ið hann í myrkrinum helt, at báturin vendi út frá landi, koyrdi hann spakuliga á motorin.

– Men nú vísti tað seg, at Halgir, sum var í bjargingarbátinum, fekk ikki kappað línuna, og tískil var bjargingarbáturin hangandi uppi í útróðrarbátinum. Einu løtuna stendur á, og nú fer bjargingarbáturin undir.

Tá ið Eirikur nú einki hoyrir ella sær til beiggja sín, leypir hann eisini í havið í yvirlivilsisdraktini fyri at finna beiggjan.

– Eg síggi beiggja mín aftur, og nú liggja vit báðir og flóta í briminum, meðan báturin melur í klingur rundan um okkum við bjargingarbátinum afturút. At endar slitnar bjargingarbáturin úr, meðan útróðrarbáturin heldur fram at mala rundan um okkum. At enda steðgar maskinan á bátinum, og teir gera av at svimja aftur til bátin. Beiggi mín sleppur fyrst umborð og hjálpir mær síðan eisini umborð.

Í bølamyrkrinum vita teir ikki, um nøkur hjálp er á veg, men tá ið teir eru komnir umborð aftur á Emily, síggja teir, at ein 35 fót stórur útróðrarbátur, Petur M, við Sigmundi og Peturi Mikkelsen, er komin teimum til hjálpar.

Jónrit var eisini skjót á staðið og kundi lýsa við ljóskastara, so betur sást, hvussu vorðið var.

– Brimil kom eisini á staðið, men vit fóru ikki av Emily, fyrr enn reyvin á bátinum fór undir. Tá lupu vit í havið. Halgir fór umborð á gummibátin hjá Brimli og eg fór umborð á Petur M.

Eirikur sigur, at tað var ongantíð vandi á ferð eftir, at hjálpin var komin.

Hann sigur, at eingin trupulleiki var at halda hitanum í yvirlivilsisdraktunum, meðan teir lógu í sjónum – hvørki, tá ið teir lógu í briminum undir landi, ei heldur tá ið teir lupu í havið, tá ið reyvin á Emily fór undir og teir hildu, at báturin fór at søkka.

Eirikur kom á Tvøroyri um midnáttina sunnukvøldið við Petur M, men Halgir, sum var umborð á Brimli, ið sleipaði Emily, sum lá ógvuliga tungt í sjónum, var ikki á Tvøroyri fyrr enn nakrar tímar seinni.

– Sum eg havi skilt, sakk Emily, tá ið Brimil nærkaðist bryggjuni á Tvøroyri, sigur Eirikur Poulsen.

Hann leggur aftrat, at hann og bróðurin eftir umstøðunum vóru hampiliga væl fyri eftir óhugnaligu hendingina, sum saktans kundi kostað teimum báðum lívið, um verri vildi til hetta kvøldið.

Atlantsfarið:

# Aftur til fiskiskap fyri 600.000 kr.

**Atlantsfarið hevur loyvi at hava eina ávísa hjáveiði av ymiskum fiskasløgum, tá ið roynt verður eftir svartkjafti í norskum sjógvi. Haraftrat hevur skipið loyvi at veiða 280 tons av "øðrum fiskasløgum". Reiðarin, Dánjal Johansen, viðgongur, at av teimum 108 tonsunum, sum Atlantsfarið hevur inni, nú skipið liggur í Måløy í Noregi, er ein ávís nøgd av makreli, sum teir serliga fingu í seinasta hálinum**



*Tað er stívliga eitt ár síðan, at Atlantsfarið varð keyptur úr Skotlandi. Seks mans eru við skipinum, sum lastar eini 1300 tons*

*Mynd: Edvard Joensen*

ATLANTSFARIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var norska blaðið, Bergens Tidende, sum í síðstu viku bar tíðindini um, at føroyska skipið, Atlantsfarið, varð tikið í norskum sjógvi fyri ólógliga veiði.

Sambært blaðnum, hevði norska sjóverjan illgruna um, at skipið hevði veitt makrel, og somuleiðis funnust teir at fiskarídagbókini hjá skipinum, sum teir ikki hildu var í lagi.

### Fyri rættin í gjár

Reiðarin, Dánjal Johansen í Miðvági, segði mánamorgunin við Sosialin, at Atlantsfarið liggur í Måløy í Noregi, og at viðgerðin av málinum helst kom fyri rættin í gjár.

– Vit hava fingið eitt tilboð um at rinda kr. 600.000, soleiðis at skipið kann sleppa útaftur, men enn hava vit ikki tikið støðu til hetta. Alternativið er, at vit bíða, til dómurin í málinum er fallin.

Tá ið vit tosaðu við reiðaran, var hann júst á veg til Havnar at finna út av, hvat best var at gera.

Í stuttari samrøðu, vísti hann á, at tað er torført at koma í "klemmu" við norsku myndugleikarnar.

– Hetta vísa aðrar royndir, sum føroysk skip hava havt í Noregi, sigur hann.

### Seinasta hálið

Dánjal sigur, at Atlantsfarið royndi eftir svartkjafti í norskum sjógvi, tá ið sjóverjan kom umborð.

– Skipið hevur bara botntrol umborð, og tá verður ein ávís hjáveiða av øðrum fiskasløgum. Teir royndu á leiðini, har onnur skip og eisini norsk skip royndu við botntroli.

Sum skilst á Dánjali, hevur Atlantsfarið eisini loyvi at fiska eitt nú sild og upsa í norskum sjógvi, og harumframt hevur skipið loyvi at fiska 280 tons av "øðrum fiskasløgum".

– Vit eru nú í holt við at kanna, hvat "onnur fiskasløg" merkir, og um talan her kann vera um eina ávísa nøgd av makreli.

Hann viðgongur, at av teimum 108 tonsunum, sum Atlantsfarið hevur inni, nú skipið liggur í Måløy, er ein ávís nøgd av makreli, sum teir serliga fingu í seinasta hálinum.

### Standa sína roynd

Uppá fyrispurning um fiskarídagbókina, sum norsku myndugleikarnir eisini hanga seg í, sigur reiðarin, Dánjal Johansen, at hetta hevur hann onga viðmerking til.

– Hetta má standa sína roynd, tá ið málið kemur fyri í rættinum, sigur hann.

Tað er stívliga eitt ár síðan, at Atlantsfarið varð keyptur úr Skotlandi.

Seks mans eru við skipinum, sum lastar 1300 tons.